Kristina Háfoss:

Tíðin er farin frá teimum stóru hugsjónunum

–Tíðin er farin frá teimum stóru hugsjónunum. Sjálv haldi eg meg liggja á miðjuni møguliga eitt lítið vet til høgru, men eg fari ikki at knýta meg at nakrari politiskari hugsjón, sigur Kristina Háfoss, sum kennir eina trygga búskapartilgongd, í sambandi við fullveldistilgongdina sum sítt búskaparliga aðalmál, nú hon bjóðar seg fram til løgtingsvalið

LØGTINGSVAL/SAMRØÐA

Heri á Rógvi

Kristina Háfoss streyk inn á politiska pallin í Føroyum við seinasta fólkatingsval. og hon ætlar sær viðari inn á Føroya løgting. Hon hevur útbúgving bæði sum búskaparfrøðingur og løgfrøðingur. Á myndini situr hon undir seks mánaðir gomlu dóttrini, Hildur.

Mynd: Jens Kristian Vang.

Hon feyk inn á politiska leikpallin sum eitt fok á fólkatingsvalinum 20. november. Hon hevði ongantíð áður roynt seg sum politikara, men helt seg ikki aftur undir valstríðnum, og úrslitið gjørdist, at hon varð nummar trý á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum við 361 atkvøðum. Við Høgna Hoydal sitandi úti í landsstýrinum er hon varamaður á fólkatingi. Hennara fakliga bakgrund er sum fáum býttur í ein kommunistiskan og ein kapitalistiskan part – eiheldur í ein sosialistiskan og liberalistiskan part. Neyðugt er vera opin fyri at kanna allar møguleikar til tess at skipa eitt samfelag á bestan hátt.

Tískil ræður um at taka tað besta frá sosialismuni og tað besta frá liberalismuni til tess at sameina hesi í eina sosial-liberalismu, heldur Kristina.

Hon sigur seg kenna seg sjálva rættiliga nógv í miðjuni, men er nokk eitt sindur til høgru, um hon skal taka dagar ímillum, men vil nýta frá báðum síðum, sum hon tekur til.

Á listanum yvir mál,ið Kristina hevur tokkað til, er pláss fyri sosialum eins og búskaparligum málum. Eitt sterkt vinnulív og eitt trygt vælferðasamfelag eru tætt knýtt at hvørjum øðrum. Tí eru vinnulívspolitikkur, familjumál og eldraumsorgan mál, ið í hava hennara áhuga eins og útbúgvingar-, granskingar- og mentamál verða raðfest høgt.

–Tjóðveldisflokkurin hevur orðað nokur stevnumið, ið vit ætla at dagføra so líðandi, har vit leggja dent á at greiða frá, hvussu vit ynskja at skipa føroyska samfelagið — bæði fyri og eftir at Føroya gerast sjálvstøðugt land. Hetta eru sjónarmið, ið breið semja er um í flokkinum, hóast Tjóðveldisflokkurin er ein øgiliga breiður flokkur við fólki bæði til vinstru og til høgru, sigur Kristina Háfoss.

> *Vit hava sostatt í dag ein sera væl konsoleraðan búskap, ið er til reiðar at standa ímóti hvørt av sínum.*

Tað besta frá øllum

Nú Kristina hevur ferðast í lærdum umhvørvi í longri tíð, hevur hon hoyrt eitt sindur til teori og hugsanir. Sjálv roynir hon at halda seg so nøkunlunda á miðjuni.

–Tíðin er farin frá teimum stóru hugsjónunum. Heimurin er ikki longur býttur í ein kommunistiskan og ein kapitalistiskan part – eiheldur í ein sosialistiskan og liberalistiskan part. Tað er ikki longur so lætt at siga, at vit við fullveldi isolera okkum í Norðuratlantshavi, men hetta er júst tað øvugta av veruleiknum. Sum sjálvstøðu tjóð vilja vit fáa møguleika fyri samstarvi á jøvnum føti við alheims lond og vil hetta geva føroyska vinnulívinum og almennar tænastur, meðan tað privata tekur sær av øllum øðrum vinnuvirksemi. Tað almenna skal sjálvsagt skapa teir karmar, ið vinnulívið skal virka undir og er týðandi at skapa góðar karmar fyri vinnulívinum, skal føroyski búskapurin gerast ein sterkur sjálvberandi búskapur.

Verða privatiseringar framdar á røttum staði vilja tær gagna tí føroyska samfelagnum.

Almanna-, heilsu- og skúlamál eiga at verða almennar tænastur, men eins og loyvi er í dag skal verða pláss fyri privatpraksis hjá læknum, privatskúlum v.m. Somuleiðis eigur pláss verða fyri at útbjóða partar av tænastunum, eitt nú reingerð og matgerð.

Tá ið tað kemur til hvørjir stovnar skulu einskiljast er rætt at byrja við at privatisera tær privatu fyritøkurnar, ið gjørdust almennar vegna kreppuloysnirnar. Talan er her um Føroya Banka (Fíggingargrunnurin frá 1992), Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunnurin.

Av tí, at føroyska samfelagið er so lítið og kappingin so avmarkað skal tó ansast eftir, at ikkert monopol ikki gerst til privat monopol. Um so verður er betri at varðveita á almennum hondum.

Somuleiðis heldur hon, at føroyingar ikki nýtast at vera bangnir fyri útlendskum kapitali, tí hetta kann eisini gagna føroyska samfelagnum.

–Treytin fyri privatisering og útbjóðing av allmennum tænastum er fyrst og fremst, at borgarin fær eina betri og bíligari tænastu. Royndirnar við útbjóðing á samferðsluøkinum og ætlanirnar Postverk Føroya eru eftir mínum tykki dømir um ætlanir, ið sum er ikki bera í sær fyrimunir fyri borgaran, heldur Kristina.

Kristina sigur seg vera fegnan um, at Føroyar á vinnulívsøkinum stórtsæð eru slopnar undan einum studningsbúskapi, tí hetta hevði ógvuliga keðilig árin á føroyska vinnulívið og búskapin sum heild.

–Vit skulu halda okkum burtur frá studningsbúskapi – tá ið umræður vinnulívið við vinnulívsstudningi eins væl og samfelagið við ríkisstuðli – og soleiðis arbeiða fram ímóti einum trygdum og sjálvberandi føroyskum búskapi til frama fyri øll, ið sjálvsagt verður grundaður á føroyskar framleiðsluinntøkur og figgjaríløgur, sigur Kristina.

Fullveldi – framtíð

Hugtakið fullveldi var ovast á dagsskránni við seinasta løgtingsval. Seinastu fýra árini hevur fullveldi stoðugt verið uppi at vent, og landsstýrið hevur í fleiri ætlanum roynt at rokkið málinum, og tað er einki at taka seg aftur í, at tað einamest hevur verið Tjóðveldisflokkurin, ið hevur gingið á odda fyri fullveldinum. Kristina hevur eisini sjálvt verið fortalari fyri fullveldinum, har tað mest hava verið tey búskaparligu sjónarmiðini, ið hon hevur ført fram.

Búskaparliga vil tað, sambært Kristinu, eisini viðføra batar fyri Føroyar at fáa fullveldið, og hetta skyldast einamest tí, at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap, eitt meira kappingarført vinnulív og betri samskiftis- og handilsmøguleikar við útlond.

Kristina tekur undir við løgtingssamtyktini um Sjálvstýri Føroya Fólks og harvið teirri tilgongdini, ið koyrir eftir tí leisti, at arbeitt verður framímóti at yvirtaka málsøki eftir heimastýrislógini og síðani hava eina fólkaatkvøðu um fullveldi.

–Tjóðveldisflokkurin ynskir at seta dagsskránna fram til eitt fullveldi, men vit ynskja so sanniliga eisini at seta dagsskránna eftir eitt fullveldi, sigur Kristina.

Ein skynsamur búskaparpolitikkur er altavgerandi hjá Kristinu um fullveldi skal vera veruleiki.

Í spurninginum um ein framtíðar føroyskan búskap, so væntar Kristina, at vit eitt nú fara at síggja ein munandi øðrvísi arbeiðsmarknað, ið leggur upp fyri fleiri tingum, enn hann hevur gjørt frammanundan. Her verður hugsað um, at tað verður gjørt lættari og høgligari hjá fólki í ynskja niðursetta tíð ella alternativa arbeiðstíð á annan hátt, eitt nú eldri fólk og fólk við smærri børnum.

–Eg rokni við, at vit fara at síggja eina øðrvísi arbeiðsmarknað, ið verður meira flexibul, og eftirlønir, barsilsskipanir v.m. fara í framtíðini eisini at verða figgjaðar meira av arbeiðsmarknaðinum. Helst fer inntøkuskatturin eisini at gerast lægri, meðan skattur og avgjøld á heilsuskaðiligt og dálkandi virksemi fer at hækka. Samstundis rokni eg við, at framtíðarbúskapurin fer at verða merktur av størri tænastusektori og fleiri vælferðartænastum. Føroyskt vinnulív fer samstundis at gerast munandi meira fjøllbroytt, har oljuvinnan og fiskivinna fara at spæla ein tøðandi leiklut, men har tænastuvinnur og vinnur við tilknýti til mentan og granskning fara at fáa størri leiklut enn í dag, sigur Kristina.

Tað nógv umtalaða pensjónsøki sær Kristina eisini sum eitt álvarsmál, sum krevur eina heildarloysn.

Álvarsmál tí núverandi skipan er bygd á aðrar fyritreytir enn tær framtíðin hevur at bjóða. Nú tey í arbeiðsføra aldrinum gerast alsamt færri og tey eldri fleiri í tali, verður eitt nú neyðugt við eini nøggjari eftirlønarskipan. Neyðugt er, at nøggj eftirlønarskipan verður sett í verk, ið tryggjar, at øll á arbeiðsmarknaðinum gjalda í skipan, ið er óheft av landskassanum, meðan landskassin ella annar óheftur grunnur stjórnini vald. Hartil kann nevnast, at sambært seinastu skjølunum, ið eru komin fram viðvíkjandi ríkisstuðlinum til Føroyar er greitt, at danski staturin valdi at gera Føroyar heftar at donsku ríkisveitingini til tess at gera tað truplari fyri Føroyar at gerast óheftar av Danmark - føroyingar hava tó sjálvir gjørt av at nýta henda pening, sigur Kristina.

Blokkur – búskaparvøkstur

–Í dag taka føroyskir myndugleikar ímóti peningi fyri at lata donsku ríkisstuðlinum hevur havt nógv árin á føroyska búskapin. Millum hesi teljast ringárin, (multiplikator), størri kreditvirði og verri kappingarevni. Harafturat nevnir Kristina eisini, at ríkisstuðulin hevur havt tað árini, at Føroyar eru vorðnar minni politiskt-, umsitingarliga- og búskaparliga sjálvbjargnar og verri fyri at fyrireika okkum til konjukturbroytingar vegna verri gjøgnum skygni.

–Eftir 4 ár við fullveldisætlanini hægst á dagsskránni er føroyski búskapurin sera lítið heftur av danska ríkisstuðlinum. Gongdin seinastu árini hevur borið við sær, at alsamt minni partur av ríkisstuðlinum verður nýttur úti í samfelagnum og harvið skapast nærum ongin ringárin av ríkisstuðulinum í dag. Ríkisstuðulin kemur fyri tað mesta upp í føroyska búskapin sum inntøka hjá landskassanum, og skal tískil broytast til eftirspurning eftir arbeiðsmegi og tilfari, áðrenn stuðulin hevur nakra ávirkan á BTÚ og ringárin á føroyska búskapin. Í dag verður bert uml. 7% av ríkisstuðlinum nýttur til almennar útreiðslur – hartil koma útreiðslur til rentur og avdrøg av uttanlandaskuld. Ríkisstuðulin hevur tískil ongantíð havt so lítlan tøðning sum í dag, síðan hann kom inn í føroyska búskapin, vísir Kristina á.

Millum árinini av ríkisstuðulinum er, sambært Kristinu, verri kappingarevni hjá føroyska vinnulívinum. Ríkisstuðulin hevur gjørt tað torført hjá vinnugreinum, ið eru í kapping við vinnugreinir uttanlands vegna hægri prís- og lønarstøði í Føroyum við enn uttan blokki. Innflutningur av útlendskari arbeiðsmegi til fiskivinnuna hevur tó gjørt, at høga lønarlagið hevur havt minni ávirkan enn annars.

Kristina sigur, at ríkisstuðulin hevur sum áðurnevnt eisini havt nøkur góð árin fyri føroyska samfelagið, eitt nú lægri rentustøði (vegna danska kreditvirðið) og somuleiðis er infrastruktururr v.m. bygdur í størri mun enn uttan ríkisstuðul.

–Skal takast samanum haldi eg, at ríkisstuðulin hevur borið við sær fleiri negativ árin enn positiv – serstakliga við atliti til okkara sjálvbjargni, sigur Kristina.

Sitandi samgonga – búskaparstýring

Vit settu eisini Kristinu spurningin um, hvussu sitandi samgonga hesi seinastu fýra árini hevur ávirkað føroyska búskapin. Sum heild kennir Kristina tey seinastu fýra árini sum eina góða tíð fyri tann føroyska búskapin. Eisini innanfyri stýring av búskapinum er ein menning farin fram, soleiðis at mann er klárur til at taka á ein sjálvberandi fullveldisbúskap.

–Ráðgevingin í Føroyum hevur seinastu árini – ikki bert tey seinastu fýra árini – gjørt stór framstig, og vit hava í Føroyum eina góða, óhefta búskaparráðgeving umvegis eitt nú Búskaparráðið, Landsbankan, Fíggjarmálastýrið, Hagstovuna, og hetta eiga vit at halda áfram við. Vit eiga harumframt at fáa fleiri fólk til at menna búskapartólini og ráðgevingina – har eiga vit ikki at spara, heldur Kristina.

Vit hava leingi verið afturúrsigld tá ið umræður eitt nú prístal og tjóðarroknskap — men við bert heilt fáum fólkum afturat, so vilja vit vera munandi betri fyri. Ein orsøk til, at tað gekk so illa í 80'unum var, at man ikki varð kunnaður um, hvussu búskaparstøðan var. Politikararnir vóru heldur ikki áhugaðir í at seta fólk í umsitingina, tí tað var ein góð støða fyri teir at gera sum teimum lysti vitandi um, at rokningin kom kanska tíggju ár seinni, sigur Kristina.

Hjá Kristinu er sum sagt einki at taka seg aftur í, at seinastu fýra árini hava verið góð fyri búskapin, og gongdin hevur m.a. ført við sær, at nettuuttanlandsskuldin er vorðin til eina milliard í ogn. Landskassans skuld er tó enn 3,6 mia. kr., men hinvegin er landsins uppsparing í Landsbankanum 2,5 mia. kr. og eigur landið hartil aðrar ognir í grunnum og felagum, ið eru mettar at verða uml. 4,5 mia. kr.

–Vit hava sostatt í dag ein sera væl konsoleraðan búskap, ið er til reiðar at standa ímóti hvørt av sínum. Bara yvirskotið á almennu figgjarætlanini fyri 2001 er mest sannlíkt 800 mió, og hetta sigur ikki so lítið, sigur Kristina.

> *Tjóðveldisflokkurin ynskir at seta dagsskránna fram til eitt fullveldi, men vit ynskja so sanniliga eisini at seta dagsskránna eftir eitt fullveldi*

–Hetta skyldast bæði teirri góðu búskaparstýring, ið hevur verið við fullveldisleistinum, men skyldast í stóran mun tað stóra arbeiðið, ið føroyingar hava lagt í, at koma føroyska búskapinum aftur á rættkjøl. Hartil hava tað verið góðar tíðir í Føroyum seinastu fýra árini við m.a. høgum fiskaprísum og góðum fiskiskapi, sigur Kristina.

Størstin vandin er, at vit fáa ein yvirupphitaðan búskap í Føroyum.

–Búskaparliga liggur størsti vandin í dag í, at vit kunnu koma til at yvirupphita búskapin. Longu í dag er vandi á veg. Vit hava samstundis hoyrt serstakliga stóru andstøðuflokkarnar boða frá stórum eyka útreiðslum sleppa teir framat landsins leiðslu eftir komandi val. Fer hetta at henda fer føroyski búskapurin aftur at ovurhitast, við at prís- og lønarstøðið veksur, at kappingarførið versnar og harvið útflutningur minkar o.s.fr. Hetta er tann veruligi búskaparligi vandin í dag, heldur Kristina.

Oljan – búskapargrunnur

Sum áður nevnt so fær ein møgulig komandi oljuvinnu stóra ávirkan á føroyska samfelagið og føroyska búskapin.

–Oljuvinnan er ein kærkomin møguleiki fyri Føroyar at fáa enn eina høvuðsvinnu.

Sum so ofta hevur verið víst á, kunnu tó eisini negativ árin standast av eini oljuvinnu – serstakliga mentunarligt og sosialt – men haldi eg, at vit ikki skulu ræðast hesi árin so nógv, um vit bert eru væl fyrireikað, sigur Kristina.

Góðar fyrireikingar eru sera tøðningarmiklar í sambandi við eina komandi oljuvinnu fyri Kristinu. Eitt nú skulu fleiri viðurskifti tillagast tí, at tað væntandi koma munandi fleiri útlendingar til Føroya.

Tá tosað verður búskaparligu støringina, er Kristina heit talskvinna fyri, at ein búskapargrunnur verður settur á stovn. Afturat búskapargrunni krevst ein varligur búskaparpolitikkur.

–Viðvíkjandi fyrireiking av búskapinum so er klárt at Búskapargrunnurin verður eitt av teimum amboðum, ið kemur at standa mest sentralt. Neyðugt er, at møguligur oljupeningur ikki fær loyvi at floyma beinleiðis inn á figgjarætlanina, men at beinleiðis inntøkur frá oljuvinnuni verða settar í Búskapargrunnin. Somuleiðis eiga aðrar inntøkur, sum ikki eru varandi at verða koyrdar í Búskapargrunnin. Tað, ið eftir er av ríkisstuðlinum eigur eisini so líðandi at verða latið í Búskapargrunnin.

Síðan skal rentuavkastið frá grunninum nótast til frama fyri okkum og eftirkomarum okkara. Tryggja vit ikki, at beinleiðis inntøkurnar frá oljuvinnuni fara í grunn og verða varandi har, kunnu inntøkur frá oljuvinnuni fáa somu ávirkan á føroyska búskapin og ríkisstuðulin hevur havt. Hetta má ikki henda, sigur ein avgjørd Kristina.

Og avkastið frá Búskapargrunninum skal heldur í landskassan enn út í samfelagið í oljukekki.

–Avkastið frá grunninum skal nýtast har størst tørvur er og til at reka skilagóða búskaparstýring. Fer avkastið í landskassan heldur enn sum kekkur út til borgaran, fær borgarin jú eisini henda pening umvegis betri tænastur, lægri skatt og ein tryggari búskap, metir Kristina.

Kristina stríðist tað næstu tíðina við at gera seg lidna sum løgfrøðing. Hon verður væntandi liðugum fáar vikur, og tá fer oll orkan til politikk og valstríð, har hon ætlar at gerast sítt fyri at sleppa inn á ting.

–Eftir 4 ár við fullveldisætlanini hægst á dagsskánni er føroyski búskapurin sera lítið heftur av danska ríkisstuðlinum. Gongdin seinastu árini hevur borið við sær, at alsamt minni partur av ríkisstuðlinum verður nýttur úti í samfelagnum og harvið skapast nærum ongin ringárin av ríkisstuðulinum í dag. Ríkisstuðulin kemur fyri tað mesta upp í føroyska búskapin sum inntøka hjá landskassanum, og skal tískil broytast til eftirspurning eftir arbeiðsmegi og tilfari, áðrenn stuðulin hevur nakra ávirkan á BTÚ og ringárin á føroyska búskapin. Í dag verður bert uml. 7% av ríkisstuðlinum nýttur til almennar útreiðslur – hartil koma útreiðslur til rentur og avdrøg av uttanlandaskuld. Ríkisstuðulin hevur tískil ongantíð havt so lítlan tøðning sum í dag, síðan hann kom inn í føroyska búskapin, vísir Kristina á.

Mynd: Jens Kristian Vang.